Bónus í Havn

søkir eftir starvsfólkum

Vit hava brúk fyri einum fólkið at arbeiða fulla tíð

Eisini hava vit brúk fyri nøkrum røskum hjálparfólkum at arbeiða aftaná skúlatíð

Umsókn við møguligum prógvi og viðmælum skulu sendast til Bónus skjótast gjørligt

Bónus Í Tórshavn
Postrúm 1059
FO-110 Tórshavn

Brúktar byrsur

Nógvar góðar brúktar byrsur á goymslu

P/f Jógvan Weihe
Heil & smásøla
Staravegur 15
Box 1008 Tórshavn
Tlf. 313897

Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá oðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Sosialurin

Toll- og Skattstova Føroya

Størv á Toll- og Skattstovu Føroya

Streymoyar øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru tvey størv leys at søkja til setan 01.10.2001, ella so skjótt til ber.

Eftirlits- og innheintingardeildin:
Høvuðsuppgávur: Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt og toll, herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

Avgreiðslan:
Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum avgreiðslu av fyrispurningum frá viðskiftafólki viðvíkjandi meirvirðisgjaldi, skatti og tolli.

Førleikakrøv: Tann, sum settur verður í eftirlits- og innheintingardeildini, skal hava roknskaparligan førleika, so sum Cand. merc., HA, HD ella líknandi útbúgving. Tann, sum settur verður í avgreiðsluni, skal hava skrivstovuútbúgving, HH-prógv ella líknandi útbúgving. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Vit kunnu bjóða:
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi
- Klokkuskipan við flextíð
- Eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

Setanartreytir: Løn- og setanartreytir, sum er treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, Hallbjørg Hansen á tlf. 310260, lokal 108.

Umsóknir: Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal vera Toll- og skattstovuni, Streymoyar Øki, Postboks 3139, 110 Tórshavn í hendi **í seinasta lagi 18.09.2001**.

Toll- og Skattstova Føroya
Streymoyar øki

Um stovnin: Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Streymoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 59 fólk.

Elin Danielsen
Útb. fysioterapeutur
Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77

ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG
HITA · MASSAGU · LINNA

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

stephansons hús

Tiltøk í sept. 2001

Norðurlandahúsið í Føroyum, Norræna Húsið í Reykjavík, N.A.P.A. (Nordens Institut på Grønland) og N.I.P.Á. (Nordens Institut på Åland) hava hvør sítt umboð á Bok- og Biblioteksmessuni í Gøteborg, Svørriki. Føroyskur luttakari er: Tóroddur Poulsen, ríthøvundur.

Málninga- og keramikkframsýningin hjá Lotte og Anders Glob er í húsinum til og við 06. september.

Tiltakið við frásagnum og kvæðing úr norðurlendskum sagnum og vísum. Tiltakið er fyri fólkaskúlan 1.-5. fl. og er úti á bygd og í Norðurlandahúsinum. Luttakarar: Hedvig Westerlund, upplestur og Petra Iversen, kvæðing.

Leygardagur 01. **kl. 9.00**
Norðurlendsk Psykiatrisk Ráðstevna

Sunnudagur 02. **kl. 16.00**
Konsert við Camerata Lysy, Schweiz

Mánadagur 03. **kl. 19.30**
Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins, sýnir norska filmin »Við Orku og Fragd« frá 2001
Fríðrikskirkjan **kl. 21.00**
Konsert við Camerata Lysy, Schweiz

Týsdagur 04. **kl. 21.00**
Mentanarhúsið í Fuglafirði
Konsert við Camerata Lysy, Schweiz

Hósdagur 06. **kl. 9.00**
BUK (Norðurlendska Barna- og Ungdómskommitein) heldur fund

Leygardagur 08. **kl. 14.00**
Fotoframsýningin hjá Gunnie Moberg, Orknoyggjar letur upp.
Konsert **kl. 19.00**
Musikkskúlastevna. Fyriskipari: Føroya Musikkskúli.

Sunnudagur 09. **kl. 16.00**
Konsert. Musikkskúlastevna. Fyriskipari: Føroya Musikkskúli.

Týsdagur 11. **kl. 19.30**
Bókmentakvøld í Norðurlandahúsinum.
Trongisvágs Skúli **kl. 19.30**
Konsert v/ Orfeus, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins. Guðrún Jóhanna Ólafsdóttir, Ísland, mezzosopran, og Víkingur Heiðar Ólafsson, Ísland, klaver

Mikudagur 12. **kl. 19.30**
Konsert v/ Orfeus, tónlistarfelag Norðurlandahúsins. Guðrún Jóhanna Ólafsdóttir, Ísland, mezzosopran og Víkingur Heiðar Ólafsson, Ísland, klaver

Hósdagur 13. **kl. 21.00**
Vísutiltak **á Sandi**. Luttakarar úr Danmark: Frits Helmuth, sjónleikari, Carl Ulrik Munk-Andersen, piano og Karsten Vogel, saxofon

Leygardagur 15. **kl. 21.00**
Vísutiltak **í Trongisvágs skúla**. Luttakarar úr Danmark: Frits Helmuth, sjónleikar, Carl Ulrik Munk-Andersen, piano og Karsten Vogel, saxofon

Sunnudagur 16. **kl. 16.00**
Vísutiltak. Luttakarar úr Danmark: Frits Helmuth, sjónleikari, Carl Ulrik Munk-Andersen, piano og Karsten Vogel, saxofon

Hósdagur 20. **kl. 17.00**
Málninga- og grafikkframsýningin hjá Astri Luihn, letur upp í Gallarí »Oyggin« **á Tvøroyri**, og verður framsýningin til og við 21. oktober

Sunnudagur 23. **kl. 16.00**
Konsert v/ Føroya Symfoniorkestri

Fríggjadagur 28. **kl. 14.00**
Fiskaaling skipar fyri almennum fundi

Leygardagur 29. **kl. 14.00**
Álendska framsýningin »Við seglskútum um Kap Horn« letur upp
Álendski sjónleikurin **kl. 16.00**
»Opalerna í Anemooka« verður framførdur.

r i ar s r i a f ri.
vi r a pa affi s ava l br
r .a. affis v i.
si r pi ra is a ar l. . .
s a ar l. . . .
affis va r pi i si r pi .

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

MERCEDES 300 TD
Árg. 84, aut., 7 persónar og krók til sølu. Í góðum standi.
Tlf. 317865 - 224910

OPEL ASTRA 1,7 D TIL SØLU
Stationcar, árg. 8/95, koyrt 130.000 km. Hevur sleipkrók og sportfelgur. Sær sera gott út.
Tlf. 283948

PEUGEOT 106 GTI
Ein sera flottur Peugeot við allari eyka útgerð til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220511

CITROEN AX 1.1
Árg. 91, koyrt 63.000 km., umvældur og sýnaður 2001.
Tlf. 371847

ELLISAKFØR
Tvær Tempo Lett knallertir til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 212717

FORD FIESTA
Árg. 87 til sølu. Koyrir, men krevur ábøtur (sveisiarbeiði) Hevur plátur.
Tlf. 251287 e. kl. 20

MERCEDES BENZ
sprinter vøruvognur, árg. 95 til sølu.
Tlf. 210193 - 441193 e. kl.18

TVEIR DAIHATSU ROCKY
árg. 87 og 88 til sølu.
Tlf. 210193 - 441193 e. kl. 18

SAAB 900 i
Automatisk gear, tónaðar rútar og alu felgur til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 219101

PEGEUT 309 1,6 TIL SØLU
Árg. 87. Eingin rustur og koyrir væl. Sýnaður 2000. Ring og hoyr meir.
Tlf. 371770 - 250501

BMW 323 i TIL SØLU
Hevur 16" sportfelgur og cd spælara. Bilurin er nýsýnaður.
Tlf. 287469

FELGUR TIL SØLU
Nýggjar 14" felgur við 5 holum til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 217479

YNSKIST
Cd spælari til bil ynskist. Merkið hevur ikki so nógv at siga.
Tlf. 251780

FORD SIERRA 1,6
Árg. 89, koyrt 120.000 km., til sølu fyri 15.000 kr. Sýnaður í mars 01.
Tlf. 447769 - 222118

OPEL OMEGA 1.8
Árg. 87 til sølu. Sýnaður 5/01
Tlf. 452089

TOYOTA HI LUX 2X4
Árg. 94, koyrt 117.000 km. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 371563 - 211563

TOYOTA CAMRY1,8
Árg. 85, til sølu fyri 16.000 kr. Nógvir eykalutir fylgja við. Er nýliga lakkeraður og varð sýnaður 27/8-01
Tlf. 213012

HONDA CIVIC EC 9
Árg. 89 við automatiskum gearum til sølu.
Tlf. 448045 - 224864

16" SPORTFELGUR
Til sølu fyri 2.000 kr. Ein felga er illa farin. Tvey dekk eru nýggj 205-45.
Tlf. 253446

OPEL ASTRA TIL SØLU
Opel Astra stationcar 1,7 TD Club-model, árg. 8/96, metalbláur, hevur koyrt 94.000 km. Er í sera góðum standi. Sýnaður í vár.
Tlf. 212475

MAZDA 626
Um hóskandi boð fæst, verður ein Mazda 626 TDI 2000, árg. 06/00 seldur. Bilurin hevur aircondition, el-rútar framman, el-spegl og summar-/vetrardekk + sportfelgur.
Tlf. 221045

TOYOTA CARINA II
árg. 89, koyrt 180.000 kr. sýnaður 12.07. í góðum standi, hevur eyka sett av sportfelgum.
Tlf. 227518 e4lla 320543

FORD FIESTA TIL SØLU
Árg. 87, koyrt 163.000 km. Krevur ábøtur.
Tlf. 221281

MITSUBISHI GALANT 2.0 TD
árg. 93, hevur koyrt 175.000 km.
Tlf. 215291 ella 455291

HONDA ACCORD
Árg. 87, koyrt 119.000 km. til sølu.
Tlf. 221281

FORD ORION TIL SØLU
Árg. 87, koyrt 162.000 km. Góður til eykalutir.
Tlf. 221281

TOYOTA CARINA
sýnaður í august 2001, árg. 88, í góðum standi – bíliga til sølu.
Tlf. 223773

VOLVO 240 GL
Ein hvítur Volvo 240 GL, árg. 88, við skaða til sølu fyri kr. 10.000. Nýggj dekk og pikadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 447041 ella 214425

FORD ESCORT 1.6
í góðum standi til sølu, árg. august 97.
Tlf. 316814 ella 223366

SPORTFELGUR TIL SØLU
Sportfelgur til Toyota Corolla v/dekkum 14". Passar eisini til Mazda.
Tlf. 332473

DATSUN BLUEBIRD 1.8 GL
typa U11, árg. 84, til sølu sum eykalutir. Eitt nýtt toppakningssett fylgir við , fyri 2.000 kr.
Tlf. 332777

BMW 325 TDS STATIONCAR
Árg. 7/95, 147.000 km. Svartur og hevur 17" sportsfelgur. Í sera góðum standi. Annar diesel bilur kann ganga uppí keypið.
Tlf. 222298

OPEL CORSA SPORT
Árg. 95 til sølu. 120 Hk, sportfelgur, senkaður, stórt anlegg, spoylarar allan vegin runt við eru eisini vetrardekk.
Tlf. 313238

VW GOLF 1,9 TDI
Árg. 93, hevur koyrt 168.000 km. Nýliga skift motor. Hevur sóltak, 15"sportfelgur og nýggj dekk. Bilurin er senkaður, vælhildin og í góðum standi.
Tlf. 214003

TIL SØLU
VW Gearkassi og 4 felgur við dekkum.
Tlf. 210560

FORD ESCORT 1.6
í góðum standi til sølu. Árg. august 1997.
Tel 316814 ella 223366

PASSAT TD1 110 TIL SØLU
Sera vælhildin 3 ára gamal hvítur Passat TD1 110 til sølu, um hóskandi boð fæst. Hevur koyrt 52.000 km.
Tlf. 311418 e. kl. 17

TOYOTA COROLLA
Árg. 87 bíliga til sølu.
Tlf. 315720 - 251457

VOLVO 240 GL
Árg. 88, við skaða. Sýnaður í 2001. Til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 258743

15" SPORTFELGUR
Passa til Peugeot og Citroen, dekkstødd 15" 205/65, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 447182 - 227191

EYKALUTIR
til Toyota Carina II, árg. 87.
Tlf. 227191 - 441582

BMW 318 IS TIL SØLU
Árg. 89 til sølu. Bilurin er reyður og hevur nýggjan motor.
Tlf. 321075 - 256442

CITROEN 1,4
Góðum standi, økonomiskur og sýnaður í januar. Til sølu fyri hægst bjóðandi boð. Anlegg kann fylgja við.
Tlf. 422326

CITROEN AX 11 TRE
Árg. 89, koyrt 106.000 km., bíliga til sølu.
Tlf. 448923 - 254321

SPORT RENAULT CLIO
árg. 94 v/ sportfelgum. Bilurin er í sera góðum standi.
Tlf. 223980

BMW 324 TD STATIONCAR
Motorur v/ kvittan. Koyrt uml. 90.000 km. Er í góðum standi.
Tlf. 223980

Amboð

BLANDIMASKINA
Eigur nakar eina blandimaskinu til 1/2 sekk at selja mær?
Tlf. 332824

TIL SØLU
Dekkmaskina go avbalanseringsmaskina til sølu fyri 9.000 kr. báðar.
Tlf. 223245 - 281386

HONDA PLENUKLIPPARI
til serprís; Model 536, breidd 53 cm, 5,5 Hk og posi 83 ltr. Fyrr 8.900 kr. nú 6.500 kr. Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

HONDA PLENUKLIPPARAR
til serprís; Model 475, breidd 47 cm., 4,5 Hk, 1 gear og posi 73 ltr. Kr. 7.500, nú 4.800 kr. Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600

TIELBURGER SLÁIMASKINA
til sølu. Áhugaði kunnu ringja á
tlf. 223527

TIL SØLU
Tielburger T33 sláimaskina til sølu. Liggjandi breidd 66 cm., er í góðum standi.
Tlf. 223527

CO2 SVEISITÓL
til sølu fyri 1.700 kr.
Tlf. 250300

EIN ELDRI KOMPRESSARI
og ein rennugravari MF 50 B til sølu.
Tlf. 441515 - 211514

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
Nærum 17 ára gamal drongur søkir arbeiði eftir skúlatíð og í vikuskiftunum.
Tlf. 320416

ARBEIÐI
Søkt verður eftir ungari og raskari gentu at gera reint einaferð um vikuna í privatum húsum.
Tlf. 3163287 e. kl. 16.30

TILBOÐ YNSKIST
uppá útgraving og stoyping av kjallaragólvi – at byrja skjótast tílber.
Tlf. 445185 e. kl. 18

REINGERÐARHJÁLP
ynskist uml. 3 tímar um vikuna.
Tlf. 316741

ARBEIÐI SØKIST
22 ára gamal maður søkir eftir arbeiði. Eg havi teldukunnleika innan ávís økir og lokið fleiri stakgreinalestrarfak í Hoydølum.
Tlf. 253468

ARBEIÐI SØKIST
Nærum 18 ára gamal drongur søkir arbeiði, alt hevur áhuga
Tlf. 258406

NAKAÐ ARBEIÐI??
Eg eri ein 21 ára gamal drongur í Havn, ið gjarna vil hava eitt arbeiði. Eg havi mest royndir innan timburarbeiði. Hevur nakar brúk fyri mær, so ring á
tlf. 227127

Barnaansing

MÆR TØRVAR
ein konu/gentu at verða heima hjá okkum, tá eg eri til arbeiðis. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, frá kl. 8.30 - 15.30 og 14.30 - 23.30, max. 15 dagar um máðnan. Harav eru tvey vikuskífti. Um hettar hevur tín áhuga, so ring á
tlf. 424636

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR
Grønur Brio barnavognur við svørtum stelli til sølu fyri 1.000 kr. Grønt regnslag fylgir við.
Tlf. 317990

TIL SØLU
Ein Combi barnavognur av slagnum Kiddy, ein hvít leðurlook babylift, ein babysittari, pusliborð og ein bilstólur 0-10 kg.
Tlf. 373439 - 250342

BILSTÓLUR
av merkinum Britax 0-13 kg. til sølu fyri 500 kr. Bert brúktur til eitt barn og er væl viðfarin.
Tlf. 321064

BILSTÓLUR
0-18 kg. til sølu fyri kr. 300,-
Tlf. 315698

BRIO COMBIVOGNUR
Vælviðfarin Brio combivognur við lift, posa og puslitasku til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 449202 - 221271

BARNASONG
Flott hvít rimasong, ið kann stillast í hædd, til sølu. Góð springmadrassa og ymiskt pynt fylgir við.
Tlf. 321031 e. kl. 17

Bátaútgerð

GLASTREVJABÁTUR
18 fót v/8 Hk Volvo Penta diesel motori til sølu.
Tlf. 250300

BÁTUR TIL SØLU
Frambygdur Kaldbaksbátur í stóðum standi.
Tlf. 444255 ella 220101

BÁTAMOTORUR
Sabb bátamotorur 16 HK við øllum til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 310286 e. kl. 18

YNSKIST TIL KEYPS
Eitt 6-mannafar ynskist il keyps, skal vera í góðum standi fyri umleið 8-10.000 kr.
Tlf. 226853 ella 455866 e. kl. 19

HAVHESTAGLÚPAR
Havhestaglúpar til sølu
Ring: 448987

SEKSÆRINGUR
ynskist til keyps, helst við fiskiloyvi.
Tlf. 313586 - 224875

Bingo

GOTT BINGO
verður í Tórshøll leygardagin kl. 20. Eykaspæl verður.
Tórshøll

GOTT BINGO
verður í Pásstovu mánakvøldið 3/9 kl. 19. Full pláta 400 kr. Nógvir góðir vinningar m. a. á lutaseðlum 3 x 1.000 kr. 15 plátur fyri 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

PENSIONISTAFELAGIÐ
í Tórshavn hevur bingo í Losjuni, Tinhúsvegur 18, mánadagin 5/9 kl. 18. Teknað verður til sunnudagstúrin 9/9.
Nevndin

DUNNUSPÆL
verður í Sandvík týskvøldið 4/9 kl. 19.30. Full pláta 300 kr. Dupult rekkja 150 kr. ella hálvt krov. Eykaspælið á 3.000 kr. endar. 20 kr. spæl verður eisini.
Bygdafelagið á Rananum

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 3/9. Nógvir góðir vinningar.
Spastikarafelagið

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður leygardagin 1/9 kl. 17. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1 lamb. Eykaspælið 1.400 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

Bøkur

YNSKIST
Spansk/Dansk og Dansk/Spansk orðabøkur ynskjast til keyps.
Tlf. 317673 e. kl. 17

HH BØKUR TIL SØLU
Til lærugreinirnar føroyskt, danskt, enskt, spanskt, marknaðarføring, vinnulívsrætt, altjóða handil, samfelagsbúskap, kunningartøkni og ársroknskap.
Tlf. 424405

BØKUR TIL FHS
Business in Action - Coca Cola og Matematik D (uttan permu) til sølu.
Tlf. 312305

BØKUR TIL SØLU
Bøkur til HH og nakrar til FHS, bíliga til sølu.
Tlf. 224925

BØKUR TIL 2HH YNSKJAST
International økonomi + hefti, ikki eldri enn 1 ár. Current Business issues. Erhvervsrettens grundregler ríthøvundur: Jens Birkmose o.a. Forlag: Birkmose.
Tlf. 441338

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki